HÁLVFINALA-2
**DYSTARSKRÁ 6 / 2023**

# H71

LEYGARDAGUR
**15. APRÍL**




## HÁLVFINALA 2

LEYGARDAGIN 15. APRÍL
KL. 18.00 MENN:

# H71- Neistin

sms
SUÐUROYAR SPARIKASSI
ARTICON
WENZEL.FO
BÓNUS
INTERSPORT
BYGMA BALSLEV
TRYGD
ADVOKATFELAGIÐ



ANNA DAM, FORKVINNA Í H71

# TAKK FYRI Í VETUR!

Kappingin hjá okkara børnum er nú av og øll okkara mongu lið hava spælt eitt ótal av dystum. Nú verður bara bíðað eftir, hvussu tað endar hjá kvinnu- og mansliði okkara. Okkara menn fingu eina strævna byrjan á Hálsi mikudagin og skulu nú vísa, hvør dugur er í teimum.

Mansliðið hevur víst dygdir í ár men liðið hevur verið sera merkt av skaðum. Tíbetur hava vit nú aftur Peter Krogh og Niklas H. Hanusarson við, men vit mangla framvegis Rók, Hilmar Leon og Róa.

Í H71 hava vit altíð sagt, at maður kemur í mans stað og vit eru nú von við at missa leikarar til útlendsk feløg. So verður eisini í ár. Rói Ellefsen á Skipagøtu ferð at spæla í bestu svensku deildini, Peter Krogh ferð at royna seg í donskum hondbólti og tað sama fer Pauli Jacobsen.

Hjá kvinnunum fara vit eisini helst at síggja fleiri fara av landinum. Enn er tó bara vist, at Jana Mittún skal royna seg í bestu donsku deildini við danska felagnum Viborg.

Hesum eru vit serstakliga errin av í Hoyvík, tí hetta vísir, at felagið hevur fatur í rætta endanum, tá ið vit fáa alt fram so evnaríkar spælarar, at umheimurin gevur tí ans og vil hava teir. Og vit missa teir ikki meira enn so, at vit í komandi landsdystum kunnu fegnast um góðu evnini. Hugsi, at tað er ikki sørt vit kunnu vera errin av, at vit í løtuni hava 10 leikarar sum leika uttanlands í bestu og næst

bestu deildini í Danmark, Norra, Svøríki og Íslandi og komandi kappingarár minst 14 leikarar.
Okkara høvuðsvenjari og ítróttarstjóri Simon Olsen hevur valt at takka fyri seg og flyta aftur til Danmarkar. Tað er eingin loyna, at saknur verður í honum og vit í H71 eru nøgd og takksom fyri tað arbeiðið hann hevur lagt í felagið tey trý árini hann hevur verið her.

**Kvinnurnar eru fremst**
Okkara kvinnulið hevur aftur í vetur givið okkum nakrar upplivingar, sum fáur hevði droymt um, at vit skuldu fáa. Steypakappingina vunnu tær eins og tær gjørdust deildarmeistarar aftur í ár, og nú standa vit við møguleikanum at vinna felagnum næsta føroyameistaraheitið hjá kvinnum. Aftur í ár tóku tær eisini hondbólts-Europa á bóli við sínum úrslitum, har tær tó at enda máttu lúta fyri spanska liðnum Atletico Guardes sum nú er í finaluni!
Tá ið vit á fyrsta sinni meldaðu kvinnu- og mansliðið hjá okkum til EHF European Cup-kappingina, var tað fyrst og fremst tí vit vildu geva spælarunum eina uppliving og møguleikan at royna avbjóðingar, vit ikki fáa í heimligu kappingini, men vit høvdu altso ikki væntað, at hetta mestsum skuldi gerast ein "never ending story"…

**Tøkk, øll somul!**
Við ídni, nærlagni og spæligleði ber til at flyta fjøll í hondbólti. Vit vilja fegin halda fram við at skapa góðar karmar so børn, ung og vaksin skulu trívast og sleppa at folda seg út sum hondbóltsleikarar í H71. Vit hava nógv gott fólk rundan um hesar góðu spírarnar, so møguleiki er at nakað gott skal spyrjast burturúr.
Tí vil eg eisini, nú árið er endað hjá okkara børnum og ungu, nýta høvið til at takka øllum, sum eru í og rundan um H71 og sum á so mongum økjum taka eitt tak fyri felagið og eru við til at lyfta tað fram, so vit eisini í framtíðini kunnu eiga ein góðan felagsskap, ið bæði gagnar heildini og tí einstaka.

Ikki minst skulu okkara stuðlar hava eina hjartans tøkk fyri trúfesti og vilja at lyfta saman við okkum. Uttan tykkum hevði tað ikki borið til.

**Tórshavnar Kommuna**
At tað ofta hevur verið tungt at reka eitt hondbóltsfelag sum H71 er eingin loyna. Tí er tað so sera kærkomið – og tað skal Tórshavnar Kommuna hava eina stóra tøkk fyri - at vit nú hava fingið játtað rakstrarstuðul stóran kr. 250.000,- á fyrsta sinni.Hóast hetta bert er ein brot partur av tí fígging vit hava tørv á, so kemur hetta sera væl við.

Túsund tøkk, øll somul, fyri tykkara íkast til H71 aftur í vetur!
Og so ynskja vit sjálvandi kvinnunum og monnunum alt tað besta og vóna, at tað hjá báðum røkkur væl á mál, nú seinastu tøkini skulu takast!

Anna Dam, forkvinna í H71


WENZEL
FORD, VOLVO OG MAZDA Í FØROYUM
WENZEL.FO
Akranesgøta 5 · Tórshavn · tel. 35 45 00
Ford
WENZEL.FO


BANKNORDIK
Áhaldni gevur úrslit
Errin høvuðsstuðul hjá føroyskum hondbólti
Meira enn ein banki

# TÁ RÆTT SKAL VERA RÆTT



ADVOKATSKRIVSTOVAN

Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Helga á Borg, adv.
Rósing Rasmussen, adv.
Kristoffur Kristoffersen, adv.ft.

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TELEFON: (298) 35 33 35 · TELEFAX: (298) 35 33 36 · WWW.JURA.FO




ID.3. Býður tær vælkomnum.
Flytur teg inn í elheimin.
**Flytur teg frameftir.**

Les um prís, koyristrekki, umhvørvisroknskap og mangt annað á
www.bilasolan.fo

**Bilasølan**
**Vegurin Langi 43, 359700**



SÁRA JÓGVANSDÓTTIR

# SIMON OLSEN

## ÍTRÓTTASTJÓRI OG VENJARI Í H71

*Í 2020 fór Simon Olsen við konu og trimum børnum umborð á flogfarið við kós móti Føroyum. Nú takkar hann fyri seg, og hann fer av landinum aftur við fleiri gullheiðursmerkjum, vinarbondum og upplivingum í viðførinum.*

- Eg eri sera takksamur fyri hesi trý árini í Føroyum. Tá ið eg hyggi aftur á tey, má eg siga, at hetta hava verið nøkur av teimum bestu árunum í mínum lívi, og familjan hevur stórtrivist her.
Tað sigur Simon Olsen, sum nú fer undir endaspurtin sum venjari hjá H71 monnum og kvinnum.

Tá ið nú 29 ára gamli danin kom til Føroya, visti hann ikki, hvat hann skuldi vænta. Korona var farið at ganga, og av somu orsøk var ikki møguligt at koma til Føroya at kanna umstøðurnar, áðrenn hann skuldi taka støðu til, um hann skuldi taka við starvinum.
- Eg hevði sera gott samskifti við Onnu





Dam og fekk boðið fulltíðarstarv við ábyrgd av monnunum, og somuleiðis ein leiklut í at menna barna- og ungdómsdeildina hjá H71. Eg sá møguleikan sum eina spennandi avbjóðing, og eitt gott fet á leiðini sum venjari, greiðir Simon frá.

## Gull og aftur gull

Liðini hjá Simon Olsen hava vunnið nógv undir hansara leiðslu, bæði í barna- og ungdómsdeildunum og í vaksnamannadeildunum. Menninirnir hava vunnið allar tríggjar steypafinalurnar, síðan Simon gjørdist venjari, og teir hava eisini verið í báðum FM-finalunum. Í fjør vann H71 føroyameistaraheitið, og venjarin ætlar at endurtaka bragdið í ár.

- Nú gleði eg meg til at fáa tann best møguliga endan við H71, sigur Simon, sum nú fer undir hálvfinalurnar við bæði kvinnum og monnum.

Í ár hevur Simon Olsen eisini havt ábyrgdina av H71-kvinnunum, sum m.a. hava verið í Spania og spælt Evropa Cup, hava vunnið steypakappingina og eru favorittar at vinna FM. Tað kann ikki sigast annað enn, at tað hevur hilnast framúr væl hjá honum.

- Kvinnurnar hjá H71 eru einanstandandi dugnaligar á hvør sínum øki og eisini sum lið, so tað hevur verið ein fragd at vant tær í ár saman við Djóna Gaard Joensen. Tað einasta, sum nívir meg er, at vit ikki spældu okkum víðari í Evropa Cup, men Guarde, sum vit møttu, eru nú í finaluni, greiðir venjarin frá.

## Børnini tosa flótandi føroyskt

Simon Olsen er ikki bara hondbóltsvenjari, men eisini familjupápi. Hann og konan, Sanne, eiga tveir synir og eina

dóttir. Dóttirin var lítil, tá ið tey komu til Føroya.
- Okkara dreingir, Malthe og Theo, lærdu føroyskt rímiliga skjótt og tosa málið flótandi í dag. Dóttirin Vilde er uppvaksin við tveimum málum, men hon brúkar fyri tað mesta føroysk orð, sigur Simon flennandi, sum ikki sjálvur dugir føroyskt. Børnini hava fingið nógv vinfólk í Hoyvík, so tað er við blandaðum kenslum, at tíðin í Føroyum nú skjótt er av.
- Børnini fara uttan iva at sakna vinfólkini, og kanska serliga tað frælsi, sum tað er at búgva í Føroyum, har børnini bara fara á gátt hjá hvør øðrum, uttan at tað skal avtalast frammanundan.
Hóast familjan nú fer aftur til Danmarkar, væntar Simon, at tey fara ofta at ferðast í Føroyum í framtíðini.
- Vit hava fingið vinfólk fyri lívið. Vit gjørdust beinanvegin partur av H71 og felagslívinum í Hoyvík. Eg minnist, at bara stutta tíð eftir at vit vóru komin til Føroya, vórðu vit boðin í ein føðingardag. Fólkini rundan um okkum gjørdu, at tað var sera lætt at fella til, og vit fara uttan iva at varðveita sambandið.

## Hugtikin av hondbóltsHoyvík

Simon Olsen hevur nógv góð orð at bera stóru H71-familjuni, sum hevur verið hansara gerandisdagur í trý ár.
- Eg eri hugtikin av øllum teimum sjálvbodnu, sum gera ein mun. Eg eri





hugtikin av felagnum, har tað er so stórur felagsskapur og gott samanhald, og eg eri hugtikin av teimum ágrýtnu spælarunum frá teimum elstu til tey yngstu. Og tað eru nógv børn í høllini uttan fyri teirra venjingartímar, sum royna at “stjala“ hvønn einasta fría sentimetur til at spæla hondbólt. Tað er bæði hugkveikandi og feitt!

## Stór menning

Simon Olsen hevur eisini verið landsliðsvenjari hjá 04kvinnum seinastu tvey árini, sum í fjør var við til HM-endaspælið í Norðurmakedonia fyri U18-landslið. Landsliðið kláraði seg væl og endaði nummar 19 av 32 londum. Føroyar spældu sjey dystir og vunnu fýra teirra. Hóast Simon flytir av landinum, heldur hann fram sum venjari hjá hesum árgangi í eina tíð afturat, tí liðið skal vera við í W19 Championship í Litava í summar.

- Avtalan við hondbóltssambandið gongur út eftir kappingina og so fáa vit at síggja, hvat hendir eftir tað. Fyri meg er tað ein stór æra at vera landsliðvenjari. Tú arbeiðir við dugnaligum ungum leikarum og ert við í menningini, og so fylgja eisini nógvar upplivingar við starvinum. Tað er ein rívandi menning, sum fer fram í landsliðshøpi.

Venjarin heldur, at hann eisini hevur sæð eina framgongd úti í feløgunum kring landið hesi seinastu trý ári.

- Tað hevur verið áhugavert at fylgt við hesari menningini, sum er farin fram og framvegis fer fram, ikki bara á landsliðunum, men eisini úti í feløgunum. Eg havi lagt til merkis, at bara hesi fáu árini, ið eg havi verið her, er størri orka løgd í menningararbeiðið, og framgongdin er týðilig.

## Nýggj avbjóðing

Eftir kappingarenda fer venjarin aftur til Danmarkar, har hann skal standa á odda fyri Randers Håndboldklub, sum er farið í holt við at byggja kvinnuliðið uppaftur, eftir at felagið fór á húsagang í fjør.

- Tíðin í H71 hevur gjørt, at eg eri vorðin ein betur venjari og hevur givið mær eina rúgvu av royndum, serliga tí, at vit hava verið í nógvum finalum, og ikki at gloyma spælt evropeiskar dystir. Eg havi somuleiðis verið so heppin at samstarva við nógv ymisk fólk, sum hava givið íblástur til spælið og samanhaldið, sigur Simon at enda.

H71 takkar Simon Olsen fyri stóra arbeiðið, um hann hevur gjørt fyri H71 og ynskja honum og familjuni blíðan byrð.


FOKUS
18:29
Lætt og stuttligt
Gjaldskort
Fígging
FramtíðarKonta
ss.fo
SUÐUROYAR SPARIKASSI
AnniJanni
















DESIGNA KØKAR **BORG** | RUNAVÍK | KLAKSVÍK | TÓRSHAVN | WWW.BORG.FO



Mynd: Portal.fo

ODDAGREIN

# SEMIFINALUR

Nú er grundspælið í landskappingini lokið í bæði BURN kappingini hjá monnum og SMS kappingini hjá kvinnunum og farið er undir endaligu fjórðings- og hálvfinalurnar, fyri at finna tey bæði liðini, ið skulu leika endaligu FM - finalurnar í hesum kappingarárinum. Kvinnurnar hjá H71 vunnu á sera sannførandi hátt grundspælið í SMS kappingini við bert at missa eittans stig - eitt megnar avrik. Hjá monnunum hjá H71 gekk eisini væl og endaðu teir á øðrum plássi við 23 stigum, trý stig frammanfyri KÍF á triðja plássi. VÍF vann grundspælið í BURN kappingini við 30 stigum.

Sum kunnugt er skipanin tann, at tey lið, ið gjørdust frá nr. 3 til 6 leika fyrst kvartfinalu, har nr. 3 møtur nr. 6 og nr. 4 møtur nr. 5. Vinnararnir av hesum kvartfinalum møtir so nr. 1 og 2 í hálvfinalum um at koma í sjálva finaluna. Í hálvfinalunum verður leikt soleiðis at tann, ið er bestur í trimum dystum, kemur í finaluna og málmunur telur ikki. Allir dystir skulu avgerast, so um dystir enda javnt, verður leikt eykatíð á tvær ferð 5 minuttir. Er tá framvegis javnt, verður dysturin avgjørdur við brotskastskapping.

Í BURN kappingini hjá monnum hava fjórðingsfinalurnar verið og vann Team Klaksvík aðra ímóti KÍF og Neistin hina ímóti StÍF. Í BURN kappingini eru hálvfinalurnar soleiðis millum VÍF og Team Klaksvík í aðrari hálvfinaluni og H71 og Neistin í hinari. Í SMS kappingini hjá kvinnunum eru

fjórðingsfinaurnar millum ávikavíst Stjørnuna og VÍF og millum Neistan og StíF. Hesir dystir vera leiktir nú um vikuskiftið og skulu vinnararnir leika í hálvfinalunum ímóti H71 og Kyndli. Fyrstu hálvfinalurnar í BURN kappingini hava verið nú í vikuni og vann VÍF á útivølli ímóti Team Klaksvík við 31 - 25.
H71 leikti í høllini á Hálsi á útivølli ímóti Neistanum og var fyri stórsta tapi sínum í hesum kappingarárinum, tá vit máttu aftur til Hoyvíkar við einum 28 - 21 tapi. Ein hevði í dystinum eina kenslu av at leikarar okkara ongantíð av álvara komu inn í dystin. Vit byrjaðu nøkunlunda nøktandi og lógu á odda í fyrsta partinum av dystinum. Fóru síðani langt afturum og vóru aftanfyri við 12 - 9 í hálvleikinum. Um miðan annan hálvleik bardu vit okkum upp á javnleik, hóast vit ikki leiktu sannførandi. Síðani skrædnaði aftur og vit fóru av vøllinum við einum 7 mála tapi. Neistamenn vóru stinnari enn vit á at kalla øllum plássum og leiktu teir nógv meiri intenst og við hugflogi.
Næsta hálvfinalan hjá H71 ímóti Neistanum verður nú leygarkvøldið hin 15. apríl kl. 1800 í Hoyvíkshøllini og er hetta ein "vinn ella forsvinn" dystur fyri H71. Vinna vit dystin, so skal leikast ein seinasta triðja altavgerandi hálvfinala í Hoyvíkshøllini hóshvøldið. Tapa vit haraftur-ímóti næsta hálvfinaludystin nú leygarkvøldið, ja so eru vit úti av kappingini.
Skulu vit vinna næsta hálvfinaludystin ímóti Neistanum nú leygardagin, so skulu sanniliga aðrir bollar á suppuna, hetta í øllum liðinum. Í verjuni skulu vit finna útvegir fyri at steðga sera góða strikuspæli neistamanna, har sera góði strikuleikurin hjá Neistanum fær ørgrynnu av málum og brotskøstum. Av strikuni skoraði Neistin 8 mál ímóti okkum í fyrstu hálvfinaluni á Hálsi, umframt at strikuleikarin fekk 5 brotskøst, ið umsett vóru til mál - íalt 13 mál í dystinum ella helvtin av øllum málunum Neistin skoraði í dystinum.
Í álopinum má eisini takast annað skinn um bak og tiktist sjálv álopsskipanin hjá okkum til dystin ongantíð at hanga saman.
Men mest avgerandi av øllum er at vit øll hoyvíkingar fara av húsum og leita okkum í Hoyvíkshøllina leygarkvøldið fyri at eyggja leikarum okkara til sigurs. Skulu vit fáa ta viðgongd, ið krevst slíkar dystir, so er neyðugt at áskoðarafjøld er til at halda leikarum okkara til og bera teir fram tyngru løturnar, so flog aftur kemur á.
Í seinastu 11 FM - finalunum í mansdeildini hevur H71 verið annar parturin í finaluni, bert í 2014 vóru vit ikki við. Men vónandi kemur ikki í ár stígur í hesa annars so jaligu gongd hjá mansliði okkara í fremstu deildini.


Vit raka málið!


Tað besta omaná
Forkela familjuna. Royn okkara
leskiliga vaniljukrem.
VANILJU
KREM
Nýggj
vøra!

fk




Pf. Jógvan Weihe

P/F Jógvan Weihe | Tel: 35 38 97 | Fax: 35 38 98

www.weihe.fo | weihe@weihe.fo



| | |
|---|---|
| 1 | Rúna Jógvansdóttir Larsen |
| 2 | Elsa Egholm |
| 4 | Brynhild Pálsdóttir |
| 5 | Vár Bentsdóttir Zachariasen |
| 6 | Bjørk Brimnes |
| 7 | Maria Halsdóttir Weyhe |
| 8 | Karin Egholm |
| 9 | Marita Mortensen |
| 11 | Lukka Arge |
| 12 | Alda av Skarði |
| 13 | Inga Maria Joensen |
| 14 | Sunniva Bogadóttir |
| 15 | Christina Turiðardóttir Arge |
| 17 | Lív Bentsdóttir Zachariasen |
| 25 | Sára Jacobsen |
| 27 | Anna Elisabeth Halsdóttir Weyhe |
| 29 | Poula Fríðheim Petersen |
| 77 | Jana Mittún |
| 99 | Guðrið Bogadóttir á Borg |

| | |
|---|---|
| **Venjari:** | Simon Olsen |
| **Hjálparvenjari:** | Djóni Gaard Joensen |
| **Liðleiðari:** | Beinta Lindberg Hansen |
| **Málmansvenjari:** | Alexander Lein Martinsen |
| **Fysiskur venjari:** | Heri Ziska |
| **Fysioterapeut:** | Sebastian Christiansen / Ingilín Holm |



| | |
|---|---|
| 1 | Torstein Sivertsen |
| 2 | Sveinur Olafsson |
| 5 | Rói Seyer Hjaltason |
| 7 | Baldur Gillason |
| 8 | Tórmóður Petursson Djurhuus |
| 9 | Jón Rói Mohr Høgnesen |
| 10 | John Skaalum Vilhelm |
| 15 | Ragnar Karlsson |
| 18 | Sakir Tróndarson Frýdal |
| 21 | Høgni Højsted |
| 23 | Ári Rúnason |
| 28 | Rói Ellefsen á Skipagøtu |
| 31 | Rói Heinason Thomsen |
| 39 | Rókur Ziskason |
| 45 | Peter Krogh |
| 50 | Alexander Lein Martinsen |
| 71 | Bogi Hansen |

| | |
|---|---|
| **Venjari:** | Simon Olsen |
| **Hjalparvenjari:** | Djóni Gaard Joensen |
| **Málmansvenjari:** | Ári Dam |
| **Fysiskur venjari:** | Heri Ziska |
| **Fysioterapeut:** | Sebastian Christiansen |
| **Liðleiðari:** | Petur O.Sivertsen / Hanus Mortensen |

BURN
FITNESS

»GOTT ER AT HAVA
GÓÐAN Í RÁÐUM«



ADVOKATFELAGIÐ

LUKAS DEBESARGØTA 8 · TEL 203040 · FAX 203041 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
LAWFIRM@LAWFIRM.FO
WWW.LAWFIRM.FO

PETUR EVEN DJURHUUS · JÓGVAN E. ELLEFSEN
INGI HØJGAARD · GUNN ELLEFSEN


MAGN
BURG
ARIN
magn



Mynd: Jens Kr. Vang

### HJALTI MOHR JACOBSEN

# HONDBÓLTS-SERFRØÐINGUR

Eg vænti, at H71 vinnur dystin leygarkvøldið. Neistin spældi ein ótrúliga góðan dyst mikukvøldið, meðan H71 spældi eitt vet undir tað, sum vit hava sæð síðstu tíðina.

Neistin vann klárt innanhýsis uppgerðina ímillum málmenninar hetta kvøldið, men uppgerðin millum Sasha og Paula verður tættari leygarkvøldið.

Um vit síggja burtur frá síðsta korterinum av dystinum mikukvøldið, hevði Neistin trupulleikar við sínum álopsspæli. Um H71 verjan klárar at steðga innspælinum til Ísak Vedelsbøl á strikuni, so fer Neistin at fáa tað trupult við at skjóta nógv mál. Ísak Vedelsbøl spældi ein framúr dyst mikukvøldið bæði í verju og álopi.

Í teimum flestu dystunum ímillum H71 og Neistan hetta kappingarárið, hevur H71 havt nokk so trupult við 5-1 verjuni hjá Neistanum. Róa og Peteri dámar væl at sleppa inn ímóti miðjuni til sínar skotstøður, men tað sleppa teir sjáldan móti hesi dugnaligu 5-1 verjuni. Neistin dugir væl at pakka verjuna saman, soleiðis at leikararnir hjá H71 noyðast at taka síni skot breitt á bakkunum ella úti á vonginum. Um H71 veruliga skal fáa gongd á sítt álopsspæl, so skulu vongleikararnir hjá H71 skora, tá ið teir fáa møguleikan. Neistaverjan gevur gott pláss til skot frá vonginum í báðum síðum.

Eg vænti, at H71 megnar at lyfta sítt álopsspæl leygarkvøldið, og tí vænti eg at H71 vinnur dystin við nøkrum málum.




Brekkutún 4 | 188 Hoyvík | Tel. +298 30 88 00 | torshavn@samskip.com | www.samskip.fo



TÍTT FLUTNINGSFELAG

SAMSKIP



VIT GERA ALT
BLIKK- OG
RØRARBEIÐI

Alt til HITA
SANITET &
VENTILATIÓN

Maria Poulsen & Co

Smyrilsvegur 8 Postboks 182 FR-100 Tórshavn Tlf. 312000




HJÁ FRÓÐA

SMYRILSVEGUR 10
TÓRSHAVN

FAROE SHIP


Mynd: Gudmund Helmsdal
LAIDERZ
Fokus på sportsfaciliteter
HOYVIKSVØLLURIN
Fyrsti FIFA QUALETY PRO
góðkendur vøllur í Føroyum.
JUTA MASTER 40/200 á EL25


www.laiderz.dk

# SPEKT kann hjálpa tær við

Bókhaldinum

Roknskapinum

Lønarumsitingini

Sjálvuppgávuni

Kapitalvinnings-
sjálvuppgávuni

Rentustuðlinum

Útlendskum
skatti

Afturrindan
av mvg

Eftirlønum

SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. ·Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn ·Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

SPEKT | løggildir grannskoðarar


OKKARA KJARNUØKI
GRANNSKOÐAN
ROKNSKAPARHJÁLP
SKATTUR
VIRKISRÁÐGEVING
BÓKHALD
MEIRVIRÐISGJALD
Skalt tú meta um framtíðina, mást tú kenna fortíðina.
sendistovan
Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI
WWW.JANUAR.FO


Tak appina
niður her
Fyll á og
koyr víðari
effo
appin





# MYNDIR FRÁ SÍÐSTA HONDBÓLTSDEGNUM HJÁ U14















HOTEL BRANDAN



ARTICON

Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo




Thomas Dam Intersport
Bøgøta 1, Klaksvík
455320

Thomas Dam Intersport
Jónas Broncksgøta 21, Tórshavn
355300

Thomas Dam Intersport
Glyvravegur 38, Glyvrar
447399




Niels Finsensgøta 5, 100, Tórshavn, 355310
@theathletesfoottorshavn

Et her, tak við ella bílegg

# mál

**Máltíð til børn & vaksin**

*Salatbarr* **Kaffi** *Tvíflísar*

**Smurd rundstykkir**




*10 Miðal salatir*

**350,-**

Spar 50 kr

Karlamagnusarbreyt 16A, Hoyvík, tel. 588256

# Frítíðin byrjar umborð




Lætt og ómakaleyst ber til at koyra bæði Danmark, Ísland og alt Evropa upp og niður, júst tá passar tær. Við egnum bili er alt nógv lættari. Pakka viðførið í bilin, koyr umborð og njót ferðina.

Tá tú ferðast við Norrönu, kanst tú byrja at halda frí, leingi áðrenn tú kemur fram til títt frítíðarstað ella summarhús. Umborð á Norrönu kanst tú halda frí, so tað stendur eftirí.

Les meira á **www.smyrilline.fo**, skriva til **booking@smyrilline.fo** ella ring **345900**

NORÐOYA SPARIKASSI

# Lán til bústaðin

Tosa við okkum um fígging



Heimlán
Bústaðarlán
Realkredittlán
Byggikreditt
Orkulán

Norðoya Sparikassi Hoyvíksvegur 67 FO-100 Tórshavn Tel. 475000 ns@ns.fo

ns.fo

FISHFACTS
www.fishfacts.com

REYNI SERVICE P/F

Umhvørvisviðurkent
ISO 14001 virki

Tórshavn: Vegurin Langi 41, Hoyvík, Tel 35 30 40
Klaksvík: Klingrugarður 3, Tel 47 30 40

HIDDENFJORD
RAISED IN THE WILD




©NUDLAVIRKIÐ

hiddenfjord.com


SISU
SKORA
VIÐ
SISU


Føroya Bjór í Hoyvík
Karlamagnusarbreyt 17
Upplatingartíðir
Mánadag-Hósdag 13.00-18.00
Friggjadag 10.00-19.00
Leygardag 10.00-16.00
Sunnudag Stongt


ANGUS
STEAKHOUSE
Kom og
royn okkara
BBQ
Spare Ribs
Bílegg borð á
angus.fo